B68-EB-Streymur:

# Fríðin klárur fyri B68

**EB/Streyma venjarin heldur ongan iva vera um, at B68 er stórfavorittur undan uppgerðini á Svangaskarði**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

EB/Streymur skal 2. hvítusunnudag á Svangaskarð. Og venjarin hjá EB/Streymi, Trygve Mortensen, heldur ongan iva vera um, at heimaliðið er stórfavorittur.

– Eg hugdi at, tá B68 í fjør vann 1–0 á heimavølli ímóti EB/Streymi. Tá var talan um tætta uppgerð. Vit vóna eisini hesa ferð tað besta, men vit ásanna, at B68 hevur nógv og gott fólk, og at teir eru upplagdir favorittar ímóti okkum, sigur EB/Streyma venjarin, sum við hesi útsøgnini roynir at lætta trýstið av sínum monnum.

Síðsta vikuskifti taptu teir tvær ferðir ímóti VB. Fyrst í landskappingini á heimavølli og so í fjórðingsfinaluni á útivølli.

Allir EB/Streyma spælararnir vóru tøkir til dystirnar seinast, og teir eru allir við aftur hesa ferð.

### Fríðin tøkur

Hjá B68 er tað greitt, at liðformaðurin Fróði Benjaminsen ikki verður við. Hann fekk reytt kort í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini ímóti NSÍ.

Marlon Jorge var leikbannaður í tí dystinum. Hann er tøkur aftur. Ta ferðina spældi Jan Petersen, sum leingi hevur verið skaddur. Hann er við í kappingini hesa ferð, og tað er Fríðin Ziskason eisini. Fyrrverandi KÍ spælarin hevur verið skaddur í nakrar vikur, men nú er hann tøkur aftur.

Marcello Marcellino hevur verið skaddur. Nú er hann farin at venja aftur. Hann er í hópinum ímóti EB/Streymi, men hann verður neyvan ímillum teir fyrstu ellivu.

B68 vann 4–1 á Sevmýri hósdagin í síðstu viku. Tá varð sagt, at spælið var sannførandi.



*Marlon Jorge var leikbannaður, tá B68 spældi móti NSÍ, men hann er nú tøkur aftur. Tað er Fróði Benjaminsen hinvegin ikki*

GÍ-Skála:

# Nú hevur Skála møguleika at arga silvurvinnararnar

**Eftir góða úrslitið ímóti meistaraliðnum hava uppflytararnir sjálvsálit, tá teir fara um Gøtueið at hitta næstbesta liðið í fjør**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Hósdagin í síðstu viku hevði Skála vitjan av føroyameistarunum í fjør. B36 noyddist til Havnar aftur við 1–1 javnleiki. Tað var sjálvsagt vónbrot hjá meistaraliðnum bara at megna javnleik ímóti uppflytarunum. Men tað hava longu verið fleiri ábendingar um, at uppflytararnir eiga eitt so mikið gott lið, at tað eru møguleikar fyri, at aðrir enn meistararnir fara at verða snýttir.

2. hvítusunnudag er møguleiki hjá Skála at arga silvurvinnararnar frá í fjør. Tá skal Skála spæla í Gøtu, har GÍ eigur fyrsta heimadystin á árinum.

Mathias Davidsen hevur sera skjótar og snildar álopsspælarar, sum kunnu gera uppgávuna hjá GÍ miðverjuni torføra. Her verður m. a. hugsað um Alexander Johansen og Jonhard Frederiksberg.

Álitið í miðverjuni hjá GÍ, Bartal Eliassen, fekk heilaskjálvta í 2. hálvleiki, tá GÍ hósdagin í síðstu viku var í Runavík. Bartal spældi alla tíðina, men síðani tá hevur hann verið noyddur at hvíla seg. Tað verður kortini roknað við, at Bartal verður førur fyri at spæla 2. hvítusunnudag.

Felags fyri GÍ og Skála er, at tey hava ikki vunnið í hesum kappingarárinum. GÍ hevur spælt javnt á Toftum og tapt í Runavík. Skála hevur tapt á Eiði og spælt javnt á heimavølli ímóti B36.

### Gamlir kenningar við aftur

Hópurin hjá GÍ hevur verið rættuliga tunnur seinastu vikurnar. Tað hevur havt við sær, at Jóan Petur Olsen, sum hevur ætlað sær at gevast við fótbóltinum, og tískil hevur vant millum lítið og einki, hevur verið noyddur at spæla, og tað hevur hann megnað sera væl.

Nú sær ljósari út hjá Johan Nielsen og hansara monnum. Súni Olsen er komin aftur úr Hollandi. Hann er loystur úr sáttmálanum, sum hann hevur havt við Zwolle, og tað er eingin ivi um, at hann verður á vøllinum frá fyrsta bríksli 2. hvítusunnudag. Einasta forðingin fyri hesum verður tað, um spæliloyvið ikki verður komið úr Hollandi.

Tað er greitt, at Poul Ennigarð verður á GÍ liðnum 2. hvítusunnudag. Poul hevur seinastu árini í sambandi við útbúgvingina verið nógv á tekniskum skúla í Danmark. Nú er útbúgvingin liðug, og Poul Ennigarð verður tískil aftur fastur fúsur í GÍ verjuni.

## Dystir um vikuskiftið

**Fótbóltur, 1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | B68-EB/S | Eiler Rasmussen |
| 20.05 | KÍ-TB | Birgir Sondum |
| 20.05 | B36-HB | Lassin Isaksen |
| 20.05 | GÍ-Skála | Suni Johansen |
| 20.05 | VB-NSÍ | Petur Skarðenni |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 18.05 | Sumba-B71 | Rúni Gaardbo |
| 18.05 | ÍF-B36 | Hans F. Hansen |
| 18.05 | KÍ-LÍF | Páll Augustinussen |
| 18.05 | VB-NSÍ | Georg Rasmussen |
| 18.05 | HB-FSV | Regin Egholm |
| Útsettir dystir | | |
| 20.05 | B36-Sumba | |
| 20.05 | FSV-VB | |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | B68-AB | Dan Højgaard |
| 20.05 | B71-TB | Ransin Djurhuus |
| 20.05 | B36-HB | Jan Gardar |
| 20.05 | GÍ-Royn | Jákup Martin Kjeld |
| 20.05 | ÍF-FSV | Jónleif Gerðisá |
| Útsettir dystir | | |
| 18.05 | Royn-B36 | |
| 18.05 | TB-B68 | |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | B68-VB | Ólavur Weihe |
| 20.05 | B36-HB | Emil Hentze |
| 20.05 | GÍ-KÍ | Niklas á Líðarenda |

B36–HB:

# Slagið um Havnina I

**Eftir vónbrotið í fjør hevur HB nú fulla ferð á, og teir mugu metast sum favorittar, nú fyrra slagið um Havnina stendur fyri framman**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað er ongan tíð lætt at seta nakran favoritt-leiklut á nakað lið í eini grannauppgerð, men mánadagin verður hetta kortini gjørt. Tað er nevnliga einki at ivast í, at HB eru favorittar, tá teir mánadagin fara á vøllin móti grannunum úr B36.

Eitt er, at HB søguliga hevur havt takið á B36, men hartil kemur spælið, sum liðini bæði hava sýnt higartil í ár.

HB hevur nevnliga snøgt sagt verið flúgvandi, og tveir sannførandi sigrar ímóti ávíkavist NSÍ og KÍ hava neyvan gjørt vónirnar um eitt gott HB ár minni.

Hinvegin var støðan júst hin sama um sama mundi í fjør, so góða byrjanin fær á ongan hátt tey í HB at leypa upp frá í ovfarakæti. Tó kunnu tey frøast um, at eingir skaðar av nøkrum slag tykjast gera seg galdandi á liðnum. Uni Arge hevur havt eitt sindur av pínu í rygginum, men roknað verður fyri vist, at hann verður við mánadagin.

Einasta ivamálið er Jóhannis Joensen, sum er staddur uttanlands, men møguliga fær hann borið soleiðis í bandi, at hann kortini verður við mánadagin.

### Motorurin ivasamur

B36 hevur ikki fingið nakra vánaliga byrjan upp á kappingarárið, men tó munnu tey í árstalsfelagnum iðra seg um stigamissin á Skála, eftir at liðið annars legði fyri við at vinna torføra útidystin í Klaksvík.

Síðani seinnu helvt av bólkaspælinum í steypakappingini hava avrikini hjá B36 tó ikki verið serliga støðug, og í øllum er ein eyðsýnd orsøk til hetta. Miðvallarmotorurin hjá liðnum, Klæmint Matras, hevur havt ein drúgvan skaða í fótinum, og uttan hann at gera tað skitna arbeiðið á miðvøllinum, gerast umstøðurnar hjá bæði verju og álopi nógv verri.

Nú er Klæmint tó spakuliga farin undir aftur venjingina, men tað er tó langt ífrá víst, at hann verður tøkur til grannauppgerðina, tó at tey flestu av teimum svørt/hvítu helst hava eina vón um, at so verður.

VB-NSÍ:

# Bert sigurin telur

**Pól Thorsteinsson hevur leikbann móti gomlu liðfeløgunum, tá NSÍ vitjar suðuri í Vági**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Fyri triðju ferð í ár bresta VB og NSÍ saman, tá farið verður undir triðja umfar í landskappingini. Liðini vóru nevnliga í sama bólki í steypakappingini, har talan gjørdist um ein sigur til hvønn.

Men eitt er steypakappingin. Nakað annað er landskappingin, og har hava bæði liðini alstóran tørv á stigum, um tey skulu fylgja við í kappingini um heiðurskrónur, soleiðis sum ætlanin var undan kappingini. Fyri bæði er nevnliga galdandi, at tey hava trý stig eftir tveir dystir, men kanska er støðan verri hjá VB, sum fekk sín ósigur móti uppflytarunum úr TB, meðan NSÍ kanska betri kann liva við at tapa í Gundadali móti HB.

### Skerdir vágbingar

Tískil eru vágbingar snøgt noyddir at vinna dystin, men undir øllum umstøðum verður tað so eitt nakað skert VB lið, sum tekur ímóti NSÍ.

Tað liggur í øllum førum greitt, at miðvallarovastin, Marek Wierzbicki, framvegis ikki er førur fyri at spæla. Eitthvørt bilar við rygginum, men nú verkfallið er av, vóna vágbingar at fáa hann undir røntguna týsdagin, so greiða fæst á, hvat slag av skaða talan er um.

Harumframt er eisini ivasamt, hvussu verður við Predrag Zivkovic og Jón Paula Olsen. Predrag hevur havt trupulleikar við knænum, men hevur tó vant í vikuni. Jón Pauli byrjaði á beinkinum seinast, og tó at hann kom inn móti dystarenda, so er tað langt ífrá víst, at hann veruliga er førur fyri at spæla mánadagin.

### Bert Pól

Hjá NSÍ er sum so einki ivamál millum leikararnar. Eingir skaðar gera um seg, men hinvegin dregur tað skeiva vegin, at Pól Thorsteinsson hevur leikbann, eftir reyða kortið í hálvfinaluni móti B68. At tað júst er dysturin í Vági, man heldur ikki gera støðuna lættari hjá Pól, men so er tað upp til Jógvan Martin Olsen at gera av, hvussu hann fer at blanda kortini, soleiðis at missurin av vágbinginum ikki verður ov stórur í Vági.



*Vágbingar hava kanska størri tørv á stigum enn NSÍ, men í løtuni er ivamál um fleiri leikarar á liðnum hjá VB*

KÍ–TB:

# Nú stendur á gomlum nøglum

**Um KÍ ikki fær fult, tá TB 2. hvítusunnudag vitjar í Klaksvík, so verður talan um kreppu í KÍ**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Tað er synd at siga, at tað hevur roynst væl hjá KÍ higartil í ár. Eftir at tvey tey fyrstu umførini eru farin afturum, hava teir einki stig, teir eru aftastir, og málmunurin er 3–7. At KÍ trilvar fyrstu umførini hevur ikki verið heilt óvanligt seinastu árini. Í fjør høvdu teir einki stig eftir tvey tey fyrstu umførini, og tað høvdu teir heldur ikki í fyrraárið.

KÍ hevur ikki verið á aftasta plássinum á støðutalvuni síðani í 1994. Tá taptu teir í fyrsta umfarinum 2–0 á heimavølli ímóti B71, og tá var KÍ aftast saman við NSÍ, sum hevði tapt 2–0 á útivølli ímóti B36.

2. hvítusunnudag kemur TB til Klaksvíkar, og KÍ og nógvu viðhaldsfólkini eru greið yvir, at nógv stendur upp á spæl. Annan sunnudag skal KÍ út á Svangaskarð, og tá tykist møguleikin fyri at fáa stig og at vinna at vera minni – í hvussu so er á pappírinum – enn hann verður, tá TB kemur norður. Kristi himmalsferðardag vann B68 landskappingardystin á Sevmýri 4–1.

Tá tað ikki gongst nakað serligt, er tað ofta so skjótt, at nógvir spælarar verða royndir, og at tískil stórar útskiftingar verða framdar. Harvið verður verri at finna rætta spælingarlagið.

Kurt Mørkøre hevur verið noyddur at gera nógvar skiftingar, tí fleiri spælarar hava verið skaddir. Tað eru framvegis skaðatrupulleikar í Klaksvík. Ove Nysted og Jan Andreasen, sum hevur trupulleikar av liðbandi í fótliðnum, skal royna at spæla í 2. deild í dag. Allan Joensen, sum fór út orsaka av vøddaskaða ímóti HB, og Heðin á Lakjuni, sum hevur trupulleikar í økslini, hava ikki vant við fullari ferð í vikuni. Um teir verða við mánadagin var ikki greitt í gjár.



*Tað verður helst verjan, sum fær mest at gera hjá TB, men um møguleikin býðst, so hava teir eisini leikarar, sum kunnu avgera ein fótbóltsdyst*

Hjá TB stendur væl til. Somu spælararnir, sum vóru við ímóti B68, eru tøkir. Tað kom sera væl við hjá TB, at teir í fyrsta umfarinum vunnu tepran sigur á VB. Tá teir fara til Klaksvíkar 2. hvítusunnudag fara fyrrverandi KÍ spælarin, Zoran Mancic, og hansara menn at dyrgja eftir javnleikinum. Men teir eiga eisini spælararnar, sum eru førir fyri at avgera, um møguleikin verður har.

Tá TB síðst spældi landskappingardyst í Klaksvík gekst ikki so væl hjá tvørámonnum. TB flutti niður í 1998. Í tólvta umfarinum, sum var á skránni 16. aug., vann KÍ á heimavølli 10–0 ímóti TB. Tað var ta ferðina, at Kurt Mørkøre skoraði fimm mál, áðrenn hann ein minutt undan leikloki fekk reyða kortið. Millum málskjúttarnar hjá KÍ var ta ferðina eisini Zoran Mancic, sum nú er spælandi venjari hjá TB.

## Soleiðis hevur tað gingið

*Talvan niðanfyri sýnir, hvussu mótstøðuliðini um vikuskiftið hava staðið seg, tá tey hava leikt móti hvørjum øðrum seinastu tíggju árini. Bert dystir í bestu mansdeildini eru íroknaðir*

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B68-EB/S | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 5-1 | - | - | 2-0-0 | 6-1 |
| KÍ-TB | - | - | - | 10-0 | - | 5-2 | 2-2 | 2-1 | 0-0 | 1-1 | 3-3-0 | 20-6 |
| B36-HB | 1-0 | 1-2 | 0-2 | 0-1 | 2-3 | 2-0 | 0-5 | 1-3 | 1-1 | 2-2 | 2-2-6 | 10-19 |
| GÍ-Skála | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| VB-NSÍ | 5-0 | 3-1 | 2-0 | 0-5 | 3-0 | - | 1-3 | - | - | 2-1 | 5-0-2 | 16-10 |

# Christian Høgni liðugur í superliguni

**Vejla sat hóskvøldið eftir við svarta peri, og nú verður roknað við, at fleiri av liðfeløgunum hjá Christiani Høgna Jacobsen fara at skifta felag**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Hóskvøldið gjørdist tað greitt, at felagið hjá Christian Høgna Jacobsen, Vejle, komandi kappingarár ikki fer at taka lut í superliguni. Í tveimum teimum seinastu minuttunum skoraði Vejle tvey mál í heimadystinum ímóti Esbjerg. Harvið tryggjaði Vejle sær trý stig, men tey vóru ikki nóg mikið. Eftir at teir í hesum umfarinum hava verið eitt ár í bestu deildini, noyddist Vejle tungu leiðina niður aftur í 1. deild.

Um teir fara at megna at flyta upp aftur komandi ár, ber sjálvandi ikki til at siga nakað um. Men tað er greitt, at fleiri av spælarunum, sum hava verið millum lyklaspælararnar í ár, ikki verða á Vejle liðnum komandi ár. Málskjúttin til 1–0 hóskvøldið, brasilski Baré, er á veg til Italia, og málskjúttin til 2–0, Alex Nørlund, sigst vera á veg til OB í superliguni.

Chrisitan Høgni Jacobsen var ikki millum teir fyrstu ellivu hóskvøldið. Hann er sáttmálabundin at Vejle. Kanska fara møguleikarnir hjá honum at økjast fyri at sleppa upp í part á besta liðnum, nú fleiri av eyðsýndu liðfeløgunum ætla sær at skifta felag.

Esbjerg var í heyst millum mest støðugu feløgini. Í vár hevur úrtøkan verið vánalig.

### Rómur í Århus

AGF hevur leingi stríðst við Vejle fyri at sleppa undan niðurflytingini. Hóskvøldið vann AGF 4–0 á heimavølli ímóti Silkeborg. Harvið staðfestu århusianararnir frammanfyri 15.742 sera væl hýrdum áskoðarum, at teir ætla sær ikki at flyta niður.

Silkeborg bjargaði sær í 32. umfarinum undan niðurflytingini. Teir tóktust sinniliga at vera farnir í summarfrí undan dystinum í Århus. Silkeborg venjarin, Morten Bruun, var so mikið argur inn á sínar spælarar, at hann bað Vejle orsaka,at Silkeborg ikki gjørdi størri mótstøðu ímóti AGF.

AB fekk seks stig hósdagin. Fyrst fingu teir stigini aftur, sum teir taptu á skriviborðinum ímóti Vejle. Upprunaliga vann AB 4–0. So mistu teir stigini til Vejle, tí AB hevði havt ov nógvar útlendingar á vøllinum. Avgerðin varð kærd, og hósdagin varð boðað frá, at AB skuldi fáa stigini aftur. Pólverjin, sum var millum teir fýra útlendingarnar (tað var ein omanfyri hámarkstalið), átti í hesum førinum at roknast millum ES borgararnar.

Hóskvøldið vann AB 4–3 á heimavølli ímóti OB, sum hevur verið við í kappingini um bronsumerkini.

FCMidtjylland vann bronsu og harvið rættin at taka lut í UEFA Cup. Teir vunnu fyri sjeyndu ferð á rað. Hesa ferð var úrslitið 3–1 á heimavølli ímóti Viborg.